Tórshavn, tann 4. juni 2015
J. nr. 15/00242

Løgtingsins Umboðsmaður
Undir Bryggjubakka 11
Postsmoga 2008
FO- 110 Tórshavn

**Viðvíkjandi setan av fulltrúa á Løgmansskrivstovuni**

Løgtingsins Umboðsmaður hevur í skrivi til Vinnumálaráðið, dagfest 3. juni 2015, mælt Vinnumálaráðnum til at taka málið upp aftur til viðgerðar. Løgtingsins Umboðsmaður sigur í sambandi við hetta tilmælið, at hon heldur, at setanarmyndugleikin ikki hevur givið setanartilmælinum og ivamálum og ósemjum í setanarbólkinum eina veruliga viðgerð.

Vinnumálaráðið vil fyrst gera vart við, at tað hevði tænt málinum, um Vinnumálaráðið fekk høvi til at gera viðmerkingar til niðurstøðurnar hjá Løgtingsins Umboðsmanni í skrivinum, dagfest 3. juni 2015, áðrenn hetta varð almannakunngjørt.

Vinnumálaráðið vil við hesum loyva sær at gera viðmerkingar til niðurstøðurnar hjá Løgtingsins Umboðsmanni í málinum.

Vinnumálaráðið er ósamt við niðurstøðuni hjá Løgtingsins Umboðsmanni og metir, at málið um setan av fulltrúa í Uttanríkistænastuni bert er viðgjørt út frá lógligum og sakligum atlitum.

*Vantandi ítøkilig meting av B*
Løgtingsins Umboðsmaður sigur á s. 5 í frágreiðingini frá 3. juni 2015:
"Vísandi til viðmerkingar mínar um útbúgvingarkrøvini í starvslýsingini haldi eg tað vera ein feil í viðgerðini, at setanarbólkurin eftir øllum at døma velur at síggja burtur frá B einans grundað á, at hann ikki hevur eina kandidatútbúgving og uttan samstundis at meta, um royndir hansara og innlit í uttanríkisøkið uppviga fyrimunin, sum eitt kandidatprógv verður mett at hava."

Tað er ikki rætt, at setanarbólkurin valdi at síggja burtur frá B einans grundað á, at hann ikki hevur eina kandidatútbúgving og uttan at gera eina ítøkiliga meting av honum.

Vinnumálaráðið hevur gjørt eina heildarmeting av førleikunum hjá B, har útbúgving og royndir eru týðandi atlit. Avgerðin varð tikin aftaná eina heildarmeting út frá hansara royndum, útbúgving, umsókn, persónligu førleikum, hildið upp ímóti førleikunum hjá hinum umsøkjarunum, ið vóru til samrøðu. Tað er tó greitt, at útbúgving er eitt týðandi atlit, tá ið mett verður um, hvør er best skikkaður til eitt starv, har akademiskur førleiki verður kravdur. B varð út frá eini heildarmeting ikki mettur at vera best skikkaður til starvið, hóast hann hevði drúgvar royndir í starvi í Uttanríkistænastuni, og varð m.a. atlit tikið til, at hann hevur eina

bachelorútbúgving við heitinum Master of Arts, ið innihaldsliga ikki er serliga viðkomandi fyri starvið, meðan aðrir umsøkjarar høvdu hollar arbeiðsroyndir og viðkomandi kandidatútbúgvingar og harafturat m.a. væl skrivaðar umsóknir, kláraðu seg væl til samrøðuna og hava persónligar førleikar, sum hóska til starvið.

Aðrir umsøkjarar høvdu sum nevnt betri útbúgvingarligar førleikar til at røkja starvið. M.a. vórðu atlit tikin til, at sambært lýsingini skal tann, sum verður settur, hava fakligar førleikar at røkja onnur øki enn "norðurlendskt samstarv", tí viðkomandi skal eisini kunna átaka sær aðrar uppgávur í Uttanríkistænastuni, og skal viðkomandi vænta, at starvsinnihaldið verður broytt sum frálíður, orsakað av regluligum rokeringum av starvsfólkum og uppgávum. Hetta var m.a. eisini frammi, tá setanarbólkurin møttist á tí fyrsta fundinum, og tá umsøkjararnir vóru til setanarsamrøðu. Umboðini fyri Vinnumálaráðið í setanarbólkinum mettu, at A, cand.jur. og D, cand.scient.pol., út frá eini heildarmeting út frá útbúgving, royndum o.ø., vóru betur skikkað at røkja eitt fulltrúastarv i Uttanríkistænastuni, har viðkomandi sambært starvslýsingini, sum frálíður, skal kunna virka breitt innan tær uppgávur, sum Uttanríkistænastan hevur at røkja.

Viðvíkjandi viðgerðini av B sigur Vinnumálaráðið í frágreiðingini til Løgtingsins Umboðsmann, dagfest 28. mai 2015:
"Viðvíkjandi B er at siga, at setanarbólkurin metti, at hann átti at sleppa til samrøðu, grundað á, at setanarbólkurin tá helt, at hann hevði eina kandidatútbúgving, umframt at hann hevði hollar arbeiðsroyndir í Uttanríkistænastuni og aðrar viðkomandi arbeiðsroyndir, ið allar serstakliga eru innan norðurlandamál."

Í somu frágreiðing sigur Vinnumálaráðið:
"Tá nýggjar upplýsingar av týdningi fyri málið nú fyrilógu, avgjørdi Vinnumálaráðið at kalla setanarbólkin saman aftur at viðgera hesar nýggju upplýsingar í málinum. Á fundi tann 16. apríl 2015 endurskoðaði setanarbólkurin tilmælið. Semja var á fundinum um, at útbúgvingarligu førleikarnir hjá B nú ikki kundu fáa somu vekt sum frammanundan.

Setanarbólkurin var samdur um, at útbúgvingarligu førleikarnir hjá B eru ikki serliga viðkomandi fyri starv sum fulltrúi í Uttanríkistænastuni, men vóru tað serstakliga hansara viðkomandi royndir, ið vigaðu tungt undir metingini, Tó varð mett, at munur er á, um ein útbúgving, hóast talan ikki er um eina fyri starvið viðkomandi útbúgving, er á bachelor- ella kandidatstøði."

Í frágreiðingini frá Løgtingsins Umboðsmanni verður spurningurin um, hvørt tað i metingini av, hvør av umsøkjarunum er best skikkaður til starvið, kann leggjast dentur á starvsroyndir í lestrartíðini. Á s. 6, 2. brot stendur m.a.:
"Sum fyrr nevnt havi eg ikki fortreytir fyri at meta um, hvør er best egnaður til starvið. Men eg haldi tað vera ósakligt at leggja dent á eitt atlit, sum í fyrstu atløgu hevði við sær, at fleiri umsøkjarar vóru sáldaðir frá, tí dentur samsvarandi lýsingini varð lagdur á, at umsøkjarar skuldu hava hollar arbeiðsroyndir eftir lokna útbúgving, uttan at tað samstundis verður viðgjørt, um hetta eisini kann koma øðrum umsøkjarum til góðar."

Til hetta skal viðmerkjast:
Bæði B og A luku kravið, sum sett varð í fyrstu atløgu, um hollar arbeiðsroyndir eftir lokna útbúgving. Tað er rætt, at í fyrstu atløgu høvdu starvsroyndir i lestrartíðini ikki týdning fyri, hvør kom til samrøðu. Hollar arbeiðsroyndir eftir lokna útbúgving var eitt minsta krav fyri at koma til samrøðu, og bæði B og A luku tað kravið. Tá tað meira nágreiniliga skuldi metast um, hvør av teimum, sum luku minstukrøvini, var best skikkaður til starvið, vóru umframt hollar starvsroyndir eftir lokna útbúgving eisini viðkomandi starvsroyndir í lestrartíðini eitt av fleiri atlitum í eini heildarmeting.

Løgtingsins Umboðsmaður tykist at vera komin til sina niðurstøðu, tí allir umsøkjarar ikki vóru mettir upp ímóti kriteriinum starvsroyndir í lestrartíðini. Men Løgtingsins Umboðsmaður sær her burtur frá, at allir umsøkjarar ikki luku minstukrøvini, m.a. hollar starvsroyndir eftir lokna útbúgving, og at starvsroyndir tí bert fingu týdning í metingini av teimum, sum luku minstukrøvini. Ella sagt við øðrum orðum: kriteriið starvsroyndir í lestrartíðini fekk ikki týdning, fyrr enn umstøðurnar hjá umsøkjarunum svaraðu til minstukriteriini. Hetta er heilt vanligt í eini støðu, har fyrisitingin skal taka eina avgerð eftir eini meting.

Tað er tí ilt at skilja, at Løgtingsins Umboðsmaður skal kunna vera komin til ta niðurstøðu, at avgerðin er tikin á ósakligum grundarlag.

Løgtingsins umboðsmaður sigur á s. 5 í skrivinum til Vinnumálaráðið, dagfest 3. juni 2015: “Um frágreiðingin hjá Vinnumálaráðnum skal skiljast sum ein grundgeving fyri, at B ikki hevði fingið í boði at komið til setanarsamrøðu, um so var, at setanarbólkurin beinanvegin var greiður um, at B ikki hevði eina kandidatútbúgving, skal eg viðmerkja, at eg haldi tað hevði verið ósakligt ikki at bjóða honum til setanarsamrøðu av hesi orsøk.”

Til hetta skal Vinnumálaráðið viðmerkja, at talan er um ein hypotetiskan spurning. Frágreiðingin frá Vinnumálaráðnum skal ikki skiljast sum ein grundgeving fyri, at B ikki hevði verið innkallaður til samrøðu.

*Grundarlagið undir seinna setanartilmælinum*
Løgtingsins Umboðsmaður sigur á s. 3 í skrivinum til Vinnumálaráðið, dagfest 3. juni 2015: “Sambært frágreiðingini, sum eg havi fingið frá Vinnumálaráðnum um málið, samanborið við skjølini í málinum, tykist eitt sindur av ógreiðu vera um, hvørja støðu ráðgevin og deildarstjórin í Løgmansskrivstovuni í setanarbólkinum høvdu til, hvørjar avleiðingar nýggju upplýsingarnar áttu at hava fyri setanartilmælið.”

Í fundarfrásøgn frá 16. apríl 2015 og í teldubrævasamskifti tann 16. og 17. apríl 2015, sí skjal 99 í málinum, sæst, at setanarbólkurin, herundir eisini umboðini fyri Uttanríkistænastuna, aftaná nýggju upplýsingarnar vóru komnar, valdu at arbeiða víðari við tveimum øðrum umsøkjarum, ið limirnir í setanarbólkinum út frá eini heildarmeting mettu vera betur skikkaðar.

Í skrivinum frá Løgtingsins Umboðsmanni til Vinnumálaráðið, dagfest 3. juni 2015, stendur: “Sambært skjølunum í málinum gera umboðini hjá Løgmansskrivstovuni vart við, at um

starvsroyndir hjá A í lestrartíðini skulu takast við í metingina, eiga eisini aðrir umsøkjarar, sum av ymsum orsøkum ikki vórðu tiknir við í viðgerðina av fyrstan tíð, at verða vigaðir í mun til hetta. Víst verður eisini til ítøkiligar umsøkjarar, sum kundu koma uppá tal, um so var."

Vinnumálaráðið vil gera vart við, at bert tað eina umboðið og "ikki umboðini" hjá Løgmansskrivstovuni í setanarbólkinum vísti á, at hann kundi hugsað sær, at eisini aðrir umsøkjarar sluppu til samrøðu. Ongin av hinum limunum í setanarbólkinum tóku undir við hesum, men valdu at arbeiða víðari við teimum, sum semja var um á fundinum 16. apríl 2015. Felags fyri teir 4 umsøkjararnar, sum tað eina umboðið ið setanarbólkinum vísir á, er, at hesir umsøkjarar vórðu sorteraðir frá, tá ið úrveljingin at koma til samrøðu fór fram í byrjanini av setanartilgongdini. Teir vórðu valdir frá grundað á, at teir stutt síðani vóru lidnir við útbúgvingina og manglaðu hollar og viðkomandi arbeiðsroyndir aftaná lokið prógv.

*Viðgerðin hjá Vinnumálaráðnum av sjálvum setanartilmælinum*
Á s. 6 í skrivinum frá Løgtingsins Umboðsmanni til Vinnumálaráðið verður sagt:
"Vísandi til hetta, og at úrslitið av viðgerðini í setanarbólkinum er, at ósemja er millum umboðini frá ávikavist Vinnumálaráðið og Løgmansskrivstovuni, áliggur tað setanarmyndugleikanum ein serlig skyldu til gjølla at viðgera tey ivamál og ósemjur, sum seinna setanartilmælið og skrivliga samskiftið millum limirnar endurspeglar til tess at kunna taka dagar ímillum, hvør er best skikkaður til starvið. Hetta meti eg ikki, at setanarmyndugleikin hevur gjørt."

Tað er ikkí ein óvanlig støða, at ein setanarbólkur ikki verður samdur um, hvør er best skikkaður at verða innstillaður til eitt starv. Støðan í hesum málinum var, at allir limir í setanarbólkinum mettu A vera skikkaða til starvið. Tveir limir mettu hana vera best skikkaða, og tveir limir valdu at innstilla hana sum nr. 2 til starvið. Leiðslan metti um, hvør av teimum innstillaðu umsøkjarunum var best skikkaður til starvið.

Í tilmælunum frá setanarbólkinum metti leiðslan, at grundgevingarnar fyri at seta A í starv vóru tyngri enn grundgevingarnar fyri at seta B.

A hevur viðkomandi kandidatútbúgving við góðum úrslitum og viðkomandi lærugreinum, hevur royndir frá almennari fyrisiting eftir lokna útbúgving, vælskrivaða umsókn, góðar málførleikar m.a. í donskum, enskum og fronskum, og hon verður mett at vera ein miðvísur og arbeiðssamur persónur, umframt at hon undir útbúgvingini hevur havt fleiri førleikagevandi lestrarstørv, eitt nú í Udenrigsministeriet, sendistovuni í Brússel, hjálparundirvísari í ES-rætti á KBH universiteti og luttikið í prosess-spæli innan ES-rætt.

Hetta skal síggjast í ljósinum av tilmælinum um at seta B í starv, sum hevur eina ikki serliga viðkomandi bachelor útbúgving, vælskrivaða umsókn, góðar málførleikar í norðurlendskum og enskum og hollar royndir á økinum, serstakliga viðvíkjandi norðurlendskum samstarvi.

Og leiðslan tók tí avgerð á hesum grundarlagnum at seta A í starv.

Vinaliga

E
aðalstjóri

/F
ráðgevi